Álit

í

løgtingsmáli nr. 39/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju (Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av brennioljugjaldinum)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð 7. november 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9., 13., 16. og 30. november og 6. desember 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Samtak, Føroya Fiskimannafelag og Maskinmeistarafelagið, Áhugafelagið Antares, Landsfelag pensjónista, Reiðarafelagið, Landsfelagið fyri bjargingarfeløg, Skipara- og navigatørfelagið, Vinnuhúsið, Havsbrún, SEV, Magn og Effo, Búskaparráðið, Landsbankan og í tveimum umførum landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, seinnu ferð saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Sum liður í fíggingini av eini skattaumskipan, hevur landsstýriskvinnan lagt hetta uppskotið fram um at hækka avgjøldini á brenniolju. Hækkingin verður framd yvir tvey tey komandi fíggjarárini, soleiðis at avgjaldið á gassolju (fýringsolja og diesel) hækkar frá:

- 0,80 kr. pr. ltr. til 1,00 kr. pr. ltr. frá 2025,

umframt at avgjaldið á tungolju hækkar frá:

- 0,10 kr. pr. ltr. til 0,90 kr. pr. ltr. í 2024 og til 1,15 kr. pr. ltr. frá 2025.

Harafturat verður møguleikin strikaður fyri at fáa brennioljugjaldið endurrindað sbrt. § 2, stk. 2-4 í lógini. Tey, ið missa møguleikarnar at fáa brennioljugjaldið endurrindað, eru:

1) vinnufyritøkur á landi, nevndar í § 2, stk. 4 í lógini
2) skip og bátar undir 20 GT, sum TAKS metir vera í vinnu og eru mvg-skrásett og
3) bjargingarbátar hjá sjálvbodnum bjargingarfeløgum, har øll arbeiðsmegin er sjálvboðin og óløn.

Undir viðgerðini í Løgtinginum og í nevndini hevur ivi tikið seg upp um, hvørt ásetingin í § 2, stk. 1 í løgtingslógini, sum tó ikki verður broytt við hesum uppskoti til broytingarlóg, um avgjaldsfrítøku fyri skip yvir 20 GT fevnir um bæði gassolju og tungolju hjá skipum yvir 20 GT, hóast ásetingin bert nevnir gassolju. Tí hevur Fíggjarnevndin vent sær til landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum við spurninginum.

Í skrivligum svari 27. november 2023 sigur Fíggjarmálaráðið, at endamálið við § 2, stk. 1 í lógini, og ætlanin hjá Løgtinginum frá byrjan hevur verið, at skip omanfyri 20 GT skulu ikki rinda brennioljugjald, tá tey bunkra olju í Føroyum, sama um talan er um gassolju ella tungolju. Fíggjarmálaráðið vísir í hesum sambandi til LM-191/2011 og LM-028/2010 fyri at sýna vilja Løgtingsins, at bæði gassolja og tungolja eru fevnd av undantakinum fyri brennioljugjald fyri skip omanfyri 20 GT. Brennioljugjaldið verður eisini umsitið soleiðis í dag, at skip omanfyri 20 GT rinda ikki brennioljugjald, tá tey bunkra olju í Føroyum.

Víðari sigur Fíggjarmálaráðið, at TAKS hevur yvir fyri ráðnum váttað, at verandi praksis verður ikki broytt orsakað av broytingum í løgtingslógini sbrt. hesum uppskoti til broytingarlóg.

Tó ger Fíggjarmálaráðið vart við, at TAKS ynskir, at § 2, stk. 1 í løgtingslógini verður nágreinað. Ta ásetingina ber ikki til at broyta í hesum uppskoti til broytingarlóg. Landsstýriskvinnan sigur seg eftir ætlan fara at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið við hesum endamálinum í 2024.

Fleiri hoyringarpartar hava víst á, at lógaruppskotið tyngir húsarhald og vinnufyritøkur fíggjarliga. SEV hevur í hoyring víst á, at hækkingin av avgjaldinum fyri tungolju fer at hava øktar rakstrarkostnaðir við sær, og at felagið hevur í hyggju at hækka prísirnar hjá øllum brúkarum nakað, umframt at gera ávísar aðrar tillagingar í egnum rakstri og íløgum. Til hetta er at siga, at skattalættin vigar væl upp ímóti hækkaðu avgjøldunum hjá flestøllum inntøkubólkum, og metingin hjá Fíggjarmálaráðnum er, at hóast tað gerst dýrari at liva vegna broyttu avgjøldini, verður meirútreiðslan fyri flestu húski umleið 200 kr. um mánaðin, sum er væl minni enn skattalættin hjá flestu húskjum, og tá er ein príshækking frá SEV við í roknistykkinum.

Fyri tey við heilt lágum inntøkum, sum fáa avmarkaðan lut í skattalættanum, tí tey frammanundan gjalda so lítlan landsskatt, men sum tó verða rakt av hækkaðu avgjøldunum, verður møguligt at søkja um eitt orkuískoyti à kr. 5.000, og hetta vigar væl upp ímóti hækkaðu avgjøldunum, sum øll verða fevnd av.

Hoyringarpartar hava víst á, at fyri vinnufyritøkur gera hækkaðu gjøldini uttan iva mun og kunnu ávirka bæði prís á vørum og tænastum eins og lønsemið hjá ávísum fyritøkum.

Endabrúkarin fer helst at uppliva eina ávísa príshækking fyri vørur og tænastur, men eitt av endamálunum við skattaumskipanini er júst at flyta skattatrýst frá lønarinntøkum til gjøld og annars at spjaða samlaðu skattabyrðuna. Í hesum sambandi má vinnuligi geirin eisini bera ein part.

Afturat hesum kann eitt úrslit av lógaruppskotinum gerast ein minkandi nýtsla av brennievni til bilin – bæði tí húsarhald og vinna fara at tálma nýtslu sína vegna hesa dýrkan, men eisini kunnu hugsast at fara at leggja um til grønari orkuloysnir. Tí verður uppskotið mett at fáa jaliga ávirkan á umhvørvið.

Undir viðgerðini er meirilutin komin eftir, at rættast er helst at halda fast við verandi skipan fyri bjargingarbátar hjá sjálvbodnum bjargingarfeløgum, har øll arbeiðsmegin er sjálvboðin og óløn, so at teir framvegis hava møguleika at fáa endurrindað brennioljugjaldið. Hetta so at samsvarið millum virksemi og stuðul ígjøgnum hesa endurrindan kann verða varðveitt.

Tí setir meirilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, nr. 2 verður orðað soleiðis:
"§ 2, stk. 2 og 4 verða strikaði og í stk. 5, sum verður stk. 3, verður ", hvørji virki koma undir stk. 4 og um" strikað.
Stk. 3 og 5 verða eftir hetta stk. 2 og 3.

Viðmerkingar
Við hesi broyting varðveita bjargingarbátar hjá sjálvbodnum bjargingarfeløgum, har øll arbeiðsmegin er sjálvboðin og ólønt, rættin at fáa endurrindað brennioljugjaldið.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Lógaruppskotið er liður í skattaumskipanini 2024-25. Ætlanin er at hækka avgjøldini á brenniolju og at strika nakrar av møguleikunum fyri at fáa brennioljugjaldið endurrindað sum liður í fíggingini av skattalættanum. Endamálið við broytingunum er sostatt at fíggja ætlaða skattalættan frá 2024.

Verður hugt nærri at uppskotinum fer hetta avgjaldsuppskotið at geva landskassanum nógvan pening. Mett verður, at í 2024 gevur uppskotið uml. 50 mió. kr. og um 80 mió. kr. árliga frá 2025.

Broytingarnar eru, at avgjaldið á gassolju (fýringsolju og diesel) hækkar frá 0,80 kr. pr. ltr. til 1,00 kr. pr. ltr. í 2025, meðan avgjaldið á tungolju fleirfaldast; frá 0,10 kr. pr. ltr. í 2023 heilt upp í 1,15 kr. pr. ltr. í 2025.

Lógaruppskotið hevur tí sera stórar fíggjarligar avleiðingar fyri okkum, sum búgva og virka í føroyska samfelagnum.

Vanliga húsarhaldið skal gjalda meira, og vinnan skal gjalda meira, samstundis sum øllum er greitt, at kostnaðarstøðið er hækkað munandi seinasta árið ella so. Alt er vorðið dýrari, og rentan er hækkað fleiri ferðir. Og sum steinur oman á byrðu kemur nú hetta lógaruppskotið, sum sjálvsagt fer at tyngja um hjá bæði vanliga húsarhaldinum og vinnuni.

Hesum førda politikkinum tekur minnilutin ikki undir við.

Øll tey, sum á ein ella annan hátt gera nýtslu av olju, skulu gjalda meira, t.e. húsarhald, bilar, bátar, SEV, skip, ídnaðurin o.s.fr., o.s.fr.

Vanliga húsarhaldið fer at gjalda meira vegna tess, at oljan til oljufýringina og bilin gerast dýrari, men eisini tí, at el-prísurin hækkar vegna hesa avgjaldslóg. SEV fer at gjalda tíggjutals milliónaupphædd meira í 2024 og 2025, og har er bert ein, ið kann gjalda ta rokningina, og tað er brúkarin hjá SEV, sum eru húsarhaldini og vinnan.

Vinnan fer eisini at merkja sviðan av hesum uppskoti – eingin ivi um tað.

Í dag fáa vinnufyritøkur á landi brennioljugjaldið endurrindað, men nú er ætlanin at strika skipanina fyri vinnufyritøkur á landi. Fyrst at hækka brennioljugjaldið og so avtaka endurrindanina av hesum til vinnufyritøkur á landi – tað fer veruliga at merkjast í vinnuni.

At vinnufyritøkur nú skulu gjalda meira vil sjálvsagt viðføra, at tær verða minni kappingarførar og kappingarførið er av størsta týdningi fyri vinnufyritøkur og fyri landið eisini.

Hjá skipum er støðan í galdandi lóg, at skip og bátar undir 20 GT, sum TAKS metir vera í vinnu og eru mvg-skrásett, hava rætt til at fáa endurrindað brennioljugjaldið, men tann rætturin verður nú strikaður.

Skip yvir 20 GT varðveita sín rætt til endurrindan av brennioljugjaldinum.

Samanumtikið metir minnilutin, at lógaruppskotið hevur sera neiligar fíggjarligar avleiðingar fyri bæði húsarhald og vinnu. Kreppa er í heiminum og kostnaðarstøðið er hækkað munandi og so koma við lógaruppskoti, sum fer at tyngja um hjá bæði húsarhaldi og vinnu – tí tekur minnilutin als ikki undir við.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. desember 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	